*Janus Kamban, myndahøggari og grafikari - *10. september 1913 - 2. Maj 2009*

Mynd: Listasavn Føroya

Janus Kamban farin

Leygarkvøldið 2. mai 2009 legði listamaðurin Janus Kamban árarnar inn 95 ára gamal.

Janus Kamban var seinasti umboðsmaður fyri fyrsta føroyska ættarliðið av myndlistafólkum, sum tóku heim við sær hetta í føroyskum høpi nýggja listarliga økið eftir kríggið. Sum rættir slóðarar góvu teir við margfeldi sínum eitt íkast til, at tað kyknaði upp eitt medvit um virði av hesari listagrein og týdning hennara fyri tann føroyska listarliga samleikan.

Listafelagið var longu sett á stovn undir krígnum, meðan teir enn búleikaðust í Keypmannahavn, og seinni kom tann vanabundna Ólavsøkuframsýningin til, eins og Janus Kamban saman við Ingolf av Reyni og Jack Kampmann settu á stovn fyrsta føroyska listaskúlan.

Janus Kamban hevur við list síni givið sítt íkast við fleiri týdningarmiklum skreytbúgvingararbeiðum. Grafisku verk hansara hava eitt tíðarleyst einfeldi, sum enn í dag eru fyrimyndarlig. "Stramma" skapið á høggmyndini lyftir gerandismyndevnið upp í ein annan heim. Við kærleika og við eyga fyri vakurleikan í gerandisdegnum og virksemi hjá vanligum menniskjum hevjar hann hesi evni til stóra list.

Sum listafólk hevur Janus Kamban útint almikið. Eisini sum menniskja, har hann ikki einans hugsaði um sína egnu list, men altíð hevur hjálpt og stuðlað øðrum listafólkum í einsliga arbeiði teirra. Á Listasavni Føroya hevur Janus Kamban sett sær djúp spor.

Hugburður hansara til listina og fatan hansara av at vera listafólk eyðkennir eisini í dag virki á listasavninum. Hann var vegvísari, so listin kundi verða til gleði fyri mong og ikki bara fyri tey fáu, fyri ein avmarkaðan skara.

Við hesum orðum takka vit Janusi Kamban fyri trúfesti og lýsa frið yvir minni hansara.

Listasavn Føroya
Helgi Fossádal, stjóri

Dagurin

4. mai. Florianus, deyður umleið ár 300. Rómverskur heryvirmaður og embætismaður. Florianus royndi at bjarga kristnum fólki, ið vórðu forfylgd, men hann varð sjálvur tikin og fyribeindur.

(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)

Føroyar fingið nýtt krígssavn

Nýggja Krígssavnið er á Leitisvegi 58 í Miðvági, har sum Bónus og Kunningarstovan halda til

Orð og myndir: Sonni Jacobsen

Fyri umleið 15 árum síðan lat Savnið 40 – 45 aftur, og dreymurin um krígssavn í Føroyum varð slóktur í mong ár. Onkur roynd hevur verið gjørd at birt lív í aftur, men til fánýtis – til í dag.

Leygardagin 2. mai 2009 lat nýggja Krígssavnið upp fyri fyrstu ferð. Dúgliga hevur verið arbeitt við at fáa alt klárt til stóra dagin og í seinastuni eru næturnar brúktar eisini. Men alt klappaði og var klárt, tá klokkan var 14 leygardagin og hátíðarhaldið byrjaði.

Eini 300 - 400 fólk, vóru møtt upp og Sørvágs Tónleikarafelag setti serligan dám á løtuna við teirra vakra hornblástri.

Eftir at hornorkestrið hevði spælt, helt Karl Jóhan Nielsen, formaður í nevndini fyri Krígssavnið, røðu. Karl Jóhan takkaði kommununum í Vágum fyri figgjarligan stuðul. Hann takkaði eisini Løgtinginum fyri, at tey við stórum meirluta samtyktu, at seta savnið á figgjarlógina, tóat lógartekninskir trupulleikar gera, at Mentamálaráðið sigur seg ikki fört fyri, at rinda út stuðul. Hann vónaði at endin varð tann, at løgtingsins vilji varð framdur í hesum máli.

Bigg Lorry - Bedford lastvognurin frá 1941, sum bretska hersetingarvaldið fekk til Føroya undir krígnum

Karl Jóhan nevndi eisini, at tíverri er tað so, at savnið ikki hevur fingið almenna góðkenning og tessvegna ikki hevur fingið umleið 70 lutir frá Savninum 40 – 45, ið liggja á Fornminnissavninum. Og hann kom eisini inn á bygningin omanfyri flogvøllin, sum nevnd og felag fyri Krígssavnið ynskja sær til endaligt savnshøli. Og vónaði, at nýliga samtyktin um at friða jarðføst minni frá stríðsárunum fór at føra til, at savnið fekk hesi høli. Tí verandi høli eru longu nú ov lítil, ikki minst, tá hugsa verður um Bigg Lorry lastbilin, stóra vatnflúgvara boyðu og stóra minu frá krígnum, sum savnið ikki eigur høli til. Bigg Lorrarin fær kortini fyribils loyvi at standa inni í hølum hjá Vága kommunu.

Síðan segði Martin Næs frá mentamálarðanum nøkur orð. Hann segði, at arbeitt verður við at tryggja krígssavninum almenna góðkenning so løgtingsstuðul kann latast. Og roknaði við, at hetta mál skjótt verður loyst. Hann slóð eisini fast, at hetta er "okkara krígssavn" í Føroyum.

Aftaná klipti Martin Næs snórin av til Krígssavnið, og varð hetta gjørt beint uttanfyri inngongdina til sjálvt savnið. Fólk streymaðu síðan inn at síggja savnið, meðan onnur fingu sær okkurt undir góman av tí ymsa, sett varð fram til tað sama.

Tað sýntist og hoyrdist á fólki, at tey vóru sera væl nøgd við savnið, uppseting og teir mongu lutir, ið longu eru savnaðir.

Stórur áhugi var fyri framsýningini

Tey vitjandi skrivaðu í gestabókina

Framsýningin er skipað við bæði myndum og lutum frá krígnum

Karl Jóhan Nielsen, formaður í nevndini fyri Krígssavnið, og Andras Mortensen, stjóri á Føroya Fornminnissavni